## Skipa seg í kvøld

Tey, ið vald vórðu í Sunda kommunu fyri komandi skeið, fara á fundi í kvøld at skipa seg. Longu. tá úrslitið var greitt valkvøldið. hittust tey valdu, og avtalaðu tá, at Kim Durhuus (myndin) verður nýggjur borgarstjóri frá 1. januar 2009 og Guðrið Samuelsen verður varaborgarstjóri. Eisini varð avtalað, at kommunan skal hava fimm fastar nevndir, heldur enn tær tríggjar, sum higartil hava verið. Eftir nýggjár verða nevndirnar hesar: fíggjarnevnd, sosiala nevnd, mentanarnevnd, byggi-/býarskipanarnevnd og umhvørvisnevnd. Skipanin fyri Sunda Kommunu verður nú broytt sambært hesum, soleiðis sum samtykt var við fyrstu viðgerð á bygdaráðsfundinum 24. novembur.



## Spæla sjónleik á Strondum

Ungir strandingar ætla nú at fáa lív aftur í sjónleikarafelagið. Sjónleikarafelagið, sum í síni tíð var ógvuliga virkið, hevur ligið stilt í nøkur ár. Nú hava ungdómar á Strondum tikið seg saman, og ætla at fáa lív í felagið aftur. Aðalfundur verður í Bygdarhúsinum í kvøld kl. 20. Fyrireikararnir vóna, at nógv fólk koma á aðalfundin.

# 45 ár



*- Tann ringasta tíðin, tað var tá málið um lílta Petur koyrdi fyri nøkrum árum síðani. Tað var ræðuligt, tú vart úthongdur í bløðunum og varð kroystur úr øllum ættum. Men tað sum ger at tú vil halda fram við arbeiðinum er gleðin tá tú sært úrslit av tí, sum tú gert, sigur Eyðun Jensen, ið hevur arbeitt innan sosiala økið í 45 ár.*

at man vil halda fram við arbeiðinum er gleðin tá tú sært úrslit av tí, sum tú gert, at síggja gleðinia í lívinum hjá teimum, sum tú hjálpir. Tað er tá at tú fært nýggja orku til at halda fram í arbeiðinum, vísir Eyðun Jensen á.

Sjálvur hevur hann ongantíð ivast í um starvið er tað rætta fyri hann, men onkuntíð hevur hann ivast í, um tað er tað heila vert.

- Tann ringasta tíðin, tað var tá málið um lítla Petur koyrdi fyri nøkrum árum síðani. Tað var ræðuligt, tú vart úthongdur í bløðunum og varð kroystur úr øllum ættum, tað føldist sum ein ordilig hetz koyrdi ímóti tær. Tá ivaðist eg alvorliga í, um tað var tað heila vert. Men eg trúði fast uppá at tað var rætt, sum vit gjørdu, og tað var ein lætti at síggja seinni, at vit tóku tað røttu avgerðina. Til tíðir er hetta hart, men hitt vigar væl upp móti tí, og tað er tí tú klárar at halda fram. Gleðin liggur í at tú sært úrslitini av arbeiðinum.

### Meira at gera í dag

Síðan nýggja barnaverndarlógin kom í gildi, hevur meira verið at gera hjá sosialu deild, men sambært Eyðuni Jensen, er tað ikki tí at børnini skikka sær verri í dag.

- Síðan nýggja lógin kom í gildi, hevur verið munandi meira at gera. Men tað er tí at arbeiðið í dag er blivið nógv meira professjonelt. Tað er ikki tí at børnini skikka sær verri, tí tað gera tey nokk ikki. Tað er bara lættari hjá tí køna eyganum at síggja trupulleikarnar, greiðir Eyðun Jensen frá.

Afturat tí er tað eisini vorðið meira náttúrligt at leita sær hjálp í dag. Fyrr var tað soleiðis at barnaverndin varð nýtt til forskrekkilsi hjá børnunum, meðan tað í dag er meira nattúrligt at leita sær sakkøna hjálp.

### Hugsar um at geva bók út

Eyðun Jensen er í dag 61 ára gamal, og hevur hann tískil møguleika at arbeiða í nøkur ár afturat, áðrenn hann leggur arbeiðshandskarnar. Hann greiðir tó frá, at hann so smátt er farin at hugsa um lívið aftaná arbeiðið.

- Men tað er ikki komið longri enn at eg so smátt eri farin at hugsa um tað. Eg havi átt bát fyrr, men eg fari neyvan at keypa mær bát aftur. Men ein tanki, ið eg havi spælt mær við, er at skriva eina bók um tað sosiala økið í Føroyum frá tí eg byrjaði og til í dag. Men tað er enn bara ein tanki eg havi spælt mær við, sigur Eyðun Jensen.

Tann 1. januar 2009 kemur nýtt býráð til, og verður tað sjeynda býráðið, ið Eyðun Jensen kemur at arbeiða undir. Heldur hann áfram líka til hann er 67, nær hann upp á átta ymisk býráð, áðrenn hann velur at takka fyri seg.



*- Fólk í Kvívík, sum sóu hendingina, søgdu at tað var sum í Hollywood-filmum at síggja. So skjótt bilurin fór útav vegnum, kom eldur í bilin, og hann kom bóltandi sum ein eldkúla oman móti bygdini, greiðir Eyðun Jensen frá*

# Kundi eins væl verið deyður

**Seks dagar áðrenn Eyðun Jensen skuldi hátíðarhalda sín 40 ára føðingardag, varð hann í einum álvarsligum ferðsluóhappi, tá hann í bili fór útav vegnum omanfyri Kvívík og fór sendandi sum ein eldkúla oman móti bygdini**

PORTRETT

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

10. juni í 1987 var eitt álvarsligt ferðsluóhapp oman fyri Kvívík. Eyðun Jensen var á veg til Vestmanna, tá hann fór útav vegnum við høgari ferð og bóltaði oman móti bygdini. Eldur kom í bilin og hann brendist sera illa. Satt at siga stóð heilt illa til hjá honum, og hann kundi eins væl verið deyður.

- Eg kom at koyra aftanfyri ein vinmann hjá mær. Eg koyrdi nakað skjótt og meðan eg yvirhálaði hann, kom eg út í vegjaðaran og fór útav vegnum, oman móti bygdini. Fólk úr bygdini komu á staðið og fingu hjálpt mær úr brennandi bilinum, og tað, saman við trygdarbeltinum, bjargaðu lívinum hjá mær, greiðir Eyðun Jensen frá.

Hann greiðir víðari frá, at tá hann var hjálptur úr bilinum, sat lásið í trygdarbeltinum enn í, men sjálva reimin var longu brend av.

### Glaður at bara sleppa við lívinum

Í tríggjar mánaðir lá hann á Hvidovre Hospital, men sjálvur minnist hann bara hetta í glimtum.

- Eg minnist tá eg kom á sjúkrahúsið, tá skuldi eg í bað, soleiðs at infektiónir ikki komu í brennisárini. Eg minnist hvussu ræðuligt tað var, tá tey noyddust at skrubba øll sárini væl og virðiliga. Eg skríggjaði og bannaði, men tey søgdu at tað var líkamikið hvussu nógv eg rópti, at tey vóru noydd at skrubba. Tað var ræðuligt, fortelur Eyðun Jensen.

Hann brendist illa um armarnar, beinini og ryggin, men fortelur sjálvur at hann ongantíð hevur borið veruligt mein av hesum. Hann var bara heppin at sleppa við lívinum.

Í dag livir hann væl, og er fyri kortum blivin abbi fyri sættu ferð. Saman við konuni Peturbjørg, sum hann hevur verið giftir við í 39 ár, eigur hann børnini Hildur, Malan og Pætur.